# 979 gjørdust íslendingar

979 útlendingar fingu íslendskan ríkisborgararætt í fjør. Serliga póllendingar valdu at gerast íslendingar. Teir vóru 166 í tali. Næst póllendingum komu filipsoyingar, sum vóru 125, og so komu 106 úr Serbia, 61 úr Teilandi og 55 úr Vietnam. Russar halda tað eisini vera áhugavert at flyta til Íslands, og 37 russar gjørdust íslendingar í 2008, skrivar Vísir. Í 16 førum var talan um ættleiðing. 34 børn, sum hava íslendskan pápa ella mammu, og sum vóru fødd uttanlands, gjørdust íslendskir ríkisborgarar í 2008.



# Viksund í ringum sjógvi

Fyri stuttum kom fram, at tann kenda norska bátasmiðjan Viksund var í so álvassomum fíggjarligum trupulleikum, at ein av áognarunum hevði biðið skiftirættin viðgera bátasmiðjuna sum trotabúgv. Men áheitanin bleiv tikin aftur í síðstu løtu. Samstundis fréttist, at Viksund skyldar 30 milliónir krónur, og at felagið nú tingast um at fáa semju um skuldina. Rune Viksund, stjóri í Viksund Båt, sigur við Aftenposten, at hann hevur góðar vónir um, at fyritøkan fer at sleppa burtur úr trupulleikunum.



*Sambýlið í Pætursgøtu verður 1. Mai latið aftur av Nærverkinum. Orsøkin er sparingar, verður sagt.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Pætursgøta 3 letur aftur

**Fólk við Aspergers syndrom kunnu ikki liva saman við øðrum, heldur ikki evnaveikum. Men tað verður eftir øllum at døma loysnin, tá Sambýlið í Pætursgøtu 3 letur aftur 1. mai. Tey avvarandi bretta nú upp um armar**

ALMANNAMÁL

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Sambýlið í Pætursgøtu 3 verður eftir øllum at døma spart burtur tann 1. mai. Starvsfólk, búfólk og avvarðandi hava fingið boðini um afturlatingina. Ætlanin er í staðin at flyta tey trý búfólkini, sum í løtuni húsast har, í annan stovn, har tey koma at búgva saman við evnaveikum.

Eliesar Jacobsen er ein av teimum avvarandi hjá búfólkunum í Pætursgøtu 3.

- Vit fara ikki at sita og hyggja at, meðan tey fara at stongja heimið hjá okkara familjum. Beiggi mín var ein tann fyrsti, sum flutti inn har, og har hevur hann búð tey seinastu níggju árini. Áðrenn búði hann á fleiri ymiskum stovnum, men einki vísti seg at rigga. Á Sambýlinum í Pætursgøtu hevur hann tað gott. Har hava tey, sum búgva har, hvør sína lítla íbúð á niðaru hædd, meðan ovara hæddin er felagsrúm fyri búfólkini, sigur Eliesar Jacobsen

Eliesar Jacobsen greiðir frá, at tað er alt avgerandi fyri fólk við Aspergers syndromi at hava slíkar umstøður, sum Sambýlið í Pætursgøtu bjóðar. Tey hava tørv á og dáma best at vera fyri seg sjálvi, og vilja helst sleppa undan sambandi við onnur fólk.

- Vit hava biðið um ein fund við landsstýriskvinnuna um málið. Aftan á verður meir at frætta um málið.

Rósa Samuelsen hevur ikki havt møguleika at seta seg inn í málið, og vísir í staðin til Nærverkið. Tá blaðið fór til prent, hevði tað ikki eydnast okkum at fáa eina viðmerking til málið frá Nærverkinum.

Sambýlið í Pætursgøtu er einasta sambýlið, ið er ætlað fólki við Aspergers syndrom. Sambýlið varð sett á stovn í 2000, tá tvey búfólk fluttu inn. Í dag búgva trý búfólk á stovninum.

# Listaskálin endavendur

**Listaskálin hevur endavent føstu framsýningini í framsýningarhølunum. Ein av broytingunum er at fyrsta pýramidan, sum framyvir verður nýtt til skiftandi framsýningar hjá einstøkum listafólki. Tróndur Patursson verður tann fyrsti, ið fær innivest her**

LIST

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Nýggi listfrøðingurin í Listasavni Føroya, Ingeborg Bugge, hevur endavent føstu framsýningini í Listaskálanum. Ætlanin við nýggju uppheingingini er bæði at koma teimum fagurfrøðiligu krøvunum á møti, og samstundis at leggja upp til at tematisera listina, eitt nú kenslubornar kvinnumyndir sigur Listasavn Føroya í tíðindaskrivi.

Elsta listin er at finna við inngongdina, og teljast verk eftir Díðriki av Skarvanesi, Niels Kruse, Jógvan Waagstein og onnur millum hesi. Síðan koma fleiri andlitsmyndir eftir Sámal Joensen-Mikines í fyrru gongini til høgru, ið fører til ta somuleiðis nýggju uppheingingina av grafikki og



*Fasta framsýningin í Listaskálanum er broytt. Verk eru flutt runt, okkurt er hongt upp av nýggjum og okkurt er lagt afturat. Ætlanin við broytingini er at tematisera listina, sigur Listasavn Føroya*

*Savnsmynd*

tóvirki, eldri sum yngri.

Í seinnu gongini til høgru eru fotomyndir – ein higartil eitt sindur undirmett tøkni – eftir Annie Heinesen og Inga Joensen at síggja, umframt tvey pappírsklipp eftir William Heinesen. Í glasstovuni út móti viðarlundini sæst tann ungi stílurin hjá Beintu av Reyni. Montrurnar eru fluttar burtur, fyri at rúmini og verkini skulu fáa meiri luft og ljós. Í klivunum oman eftir eru einstakar broytingar gjørdar. Millum annað eru verkini, sum hingu á galvunum, tikin niður fyri at vísa betri atlit at arkitekturinum. Eisini montrurnar her eru fluttar burtur. Triðja pýramidan við verkum eftir Ingálv av Reyni er enn óbroytt, men Mikines-verkini eru hongd upp av nýggjum á grámálaðar veggir í aðru pýramidu.

Samstundis fer Listaskálin undir nýggjan tátt. Fyrsta pýramidan í savninum skal eftir ætlan nýtast til skiftandi framsýningar hjá einstøkum listafólki. Tann fyrsti, ið fær heiðurin at fylla fyrstu pýramiduna, verður Tróndur Patursson, listamaður. Hann verður umboðaður við bæði eldri og yngri verkum í eini roynd at lýsa list hansara og reyða tráðin, sum er tilknýti hansara til náttúruromantisku siðvenjuna hjá Caspar David Friedrich.